# Bill Justinussen fingið ábreiðslu frá løgmanni

**Landsstýrismaðurin tekur ábreiðsluna til eftirtektar, men fær onki gjørt við tað, sum er farið**

SAMGONGUSTEV
*Áki Bertholdsen*

Bill Justinussen, landsstýrismaður hevur nú fingið eina ábreiðslu frá Anfinni Kallsberg.

Tað er framferðin, tá ið Bill Justinussen valdi siðseminevndina, sum nú hevur kostað honum eina ábreiðslu frá løgmanni.

Í teirri munnligu átaluni, sum Bill Justinussen hevur fingið í telefonini og á landsstýrisfundi týsdagin, átalar Anfinn Kallsberg, at Bill Justinussen fylgdi ikki rættari mannagongd, tá ið hann valdi siðseminevndina av nýggjum.

Av røttum átti nevndarvalið at verðið lagt fyri Landsstýrið, so at Landsstýrið fekk høvi at siga sína hugsan um teir nevndarlimir, sum Bill Justinussen ætlaði at velja í nevndina.

Hetta er ikki bara galdandi fyri siðseminevndina, men yvirhøvur, tí tá ið ráð og nevndir skulu veljast, er mannagongdin, at tað skal leggjast fyri Landsstýrið, so at tað verður kunnað um teir limir, sum verða valdir.



*– Eg hevði onki havt ímóti at sloppið undan at valt siðseminevndina og aðrar nevndir, men framyvir verða mannagongdirnar fylgdar, sigur Bill Justinussen, landsstýrismaður*

Men Bill Justinussen sigur, at Løgmaður heldur eisini, at hann kundi havt valt aðrar limir í nevndina, enn teir, sum hann hevur valt.

– Við atliti til teimum atfinningum, sum hava verið, heldur løgmaður, at nevndarvalið kundi havt verið hepnari.

Bill Justinussen valdi Onnu-Lenu Olofson í Klaksvík, Eydnu Háberg úr Havn, Dánjal á Dul Jacobsen í Havn og Jens Wang í Hoyvík í nevndina.

Afturat teimum fýra, sita læknarnir, Høgni Djurhuus, Annika Olsen og Eliesar Olsen í nevndini, teir tríggjar hevur Læknafelag Føroya valt.

## Til eftirtektar

Bill Justinussen sigur, at hann tekur ábreiðslurnar frá Løgmanni til eftirtektar og leggur afturat, at hereftir fer hann at fylgja teimum røttu mannagongdunum.

– Eg átti at vita, at mannagongdin er tann, at slíkt verður lagt fyri landsstýrið, men eg má viðganga, at eg havi ikki verið nóg tilvitaður um tað.

– Tað eru mannagongdir fyri alt møguligt og tær eru niðurfeldar í langar reglugerðir og tað tekur tíð at venja seg við alt.

Higartil hevur hann valt siðseminevnd og sjúkrahúsráðini og hann hevur í hvussu so er eina nevnd eftir at velja, og tað er nevndin fyri Húsalánsgrunnin.

– Í tí sambandi verður mannagondin fylgd og nevndin fyri Húsalánsgrunnin verður í fullari semju við alla skipanina, sigur Bill Justinussen.

Hinvegin fær hann onki gjørt við tær nevndir, hann hevur valt.

Og hann stendur framvegis fast við, at hann hevur ikki valt nevndarlimirnar eftir hvørjum trúarbólki, teir hoyrdu til, ella eftir politiskari sannføring.

Hann heldur framvegis fast við, at einasta orsøkin til, at hann valdi tey fólk, hann valdi, er tí, at hann heldur tey vera væl skikkað at kjakast um siðsemiligar spurningar.

– Men tað er ómøguligt at velja fólk, ein aldrin hevur hoyrt um og tískil er tað nátúrligt at at velja fólk, sum eg onkusvegna javi hoyrt um – hóast eg ikki kenni tey persónliga.

– Men eg havi ikki valt fólk, sum umboða ávísar trúarbólkar ella ávísar, politiskar flokkar, sigur Bill Justinussen.

Og so leggur hann afturat, at hann hevði onki havt ímóti at sloppið undan at valt hesar nevndirnar, men, sum støðan er nú, er tað hansara skylda.

– Eg havi nógv onnur mál, eg kundi hugsa mær at framt í landsstýrinum heldur enn at fordeila nevndarsessir.

# Garvaður íbirtari til Føroya at tosa um kunningartøkni

**Onglendingurin, Thomas Power, hevur ráðgivið heimsins størstu fyritøkum og nú kemur hann til Føroyar at hitta landsstýrið, vinnulívið og kvinnuligar íbirtarar**

KUNNINGARTØKNI
*Áki Bertholdsen*



*Tað er ølum greitt, at ómetligir møguleikar liggja í kunningartøknini. Mikudagin og hósdagin kemur ein kendur ábirtaður til Føroya at hada fyrilestrar og at geva góð ráð*

Í næstu viku kemur ein ein ógvuliga væl kendur og vælumtóktur enskur fyrilestrarhaldari, ráðgevari og íbirtari til Føroya.

Tað er Thomas Power, sum kemur til Føroyar at halda fundir og fyrilestrar mikudagin og hósdagin.

Tað er Innlit, sum hevur fingið mannin hendavegin . Innlit er eitt samstarv millum Føroya Sparikassa og Reveal International – FaroeLink –, ið skipar fyri skeiðum fyri føroyska vinnulívinum, sigur Innlit í tíðindaskrivi í gjár.

Thomas Power, stovnaði í síni tíð internetfelagið, Ecademy.com og nú ferðast hann heimin runt at at halda fyrilestrar og at ráðgeva um møguleikarnar við kunningartøknini.

Síðani 1990 hevur hann hildið fleiri enn 50 fyrilestrar um árið og hevur ferðast í einum 30 londum.

Í hesum sambandi hevur hann ráðgivið nøkrum av heimsins størstu fyritøkum, eitt nú Microsoft, British Telecom, Cisco, Xerox, the Financial Times, Commerce One, Ariba, Hewlett Packard, Logica, Software AG og Stratus.

Harumframt hava eisini fleiri almenn stýri í Onglandi, biðið um hansara hugsan um gongdina í Kunningartøknini, eitt nú the British Department of Trade and Industry, the Office of Government Commerce og UK Online Initiative.

Thomas Power hevur nógv á skránni teir báðar dagarnar, hann er í Føroyum. Mikudagin hittast Thomas Power og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, at umrøða gongdina í Kunningartøknini í Føroyum og umheiminum.

Sama dag tosar hann við umboð fyri KT-felagið, KT-Forum, KT-Depilin og Elektron.

Hann fer eisini at halda serstakan fund við umboð fyri nevndirnar fyri Vinnuframagrunnin, Framtaksgrunn Føroya og Notio.

Og hann fer somuleiðis at hitta bólkin »Kvinnur sum íbirtarar« fyri at skifta orð um teirra serligu viðurskifti.

## Almennur fyrilestur

Seinasta kvøldið á vitjanini í Føroyum er sett av til almennan fyrilestur, har hann fer at umrøða møguleikarnar fyri altjóða arbeiði á alnetinum, ikki bara hjá fyritøkum men sumn heild.

Innlit og SIEC-Føroyar skipa í felag fyri hesum almenna fyrilestri. SIEC/ISBE er stytting fyri the International Society for Business Education.

Heitið á fyrilestrinum er »The Power of Local and International Networking via the Internet«. Fyrilesturin verður á Føroya Handilsskúla í Havn, hósdagin kl. 19.00.

Hann kostar 300 krónur, sum skulu gjaldast á konto hjá Føroya Handilsskúla í Føroya Sparikassa í seinasta lagi mikudagin. kontonummarið er 9181-123.652-2

Fyrilesturin verður hildin á enskum. Øll eru vælkomin, sigur Innlit.

Meiri fæst at vita á www.faroelink.com og www.sparikassin.fo

# Portørarnir nýggjan sáttmála

**Semja er gjørd um nýggjan sáttmála fyri portørar og ambulansustarvsfólk**

SEMJA
*Heri á Rógvi*

Mánadagin gjørdust Fíggjarmálaráðið og Havnar arbeiðsmannafelag samd um at endurnýggja sáttmálan fyri portørar og ambulansustarvsfólk.

Sáttmálaskeiðið er frá 1. mai 2002 til til 1. oktober 2003.

Orsøkin til, at sáttmálin ikki er gjørdur fyrr enn nú, er m.a., at sáttmálin ikki gekk út fyrr enn 1. mai, sum nakað eftir hinar sáttmálarnar. Tað hevur tikið eitt sindur av tíð hjá pørtunum at semjast, og summarfrítíðin hevur eisini gjørt sítt. Tað hevur ikki tó ikki verið neyðugt at tilkallað semingsfólk.

Fíggjarmálaráðið sigur í tíðindaskrivi, at karmurin fyri henda sáttmálan er hin sami sum hjá øðrum feløgum, t.e. 6,5% í ár og 3% næsta ár í lønarvøkstri.

Afturat hesum er lønarstigin styttur niður í 12 stig. Lønarhækkingin verður at rokna frá 1. mai. Hetta ger, at portørarnir og ambulansustarvsfólki fáa ein ávísan part av hækkingini við afturvirkandi kraft.

Í nýggja sáttmálaskeiðinum skal arbeiðsgevarin, t.e. Landssjúkrahúsið, gjalda eitt eftirlønargjald áljóðandi 4,6%.

Í sáttmálan er komin grein um seming og gerðarrætt, og aðrar smávegis broytingar eru gjørdar. Talan er um eina standard formulering, sum nú er at síggja í so at siga øllum sáttmálum, ið Fíggjarmálaráðið ger. Orðingin viðvíkjur prosessina í sambandi við ósemjur um orðingar í sáttmálanum millum partarnar, greiðir Tummas Magnussen, stjóri á lønardeildini á Fíggjarmálaráðnum, frá.

Landsstýrismaðurin er væl nøgdur við sáttmálan, verður sagt.




*Ambulansufólkini hava fingið ein nýggjan sáttmála, ið gevur teimum 6,5% lønarhækkan í ár og 3% næsta ár.*

# 1 av 40 arbeiðsleysur

**1. august búðu 47.483 fólk í Føroyum, og av teimum vóru 590 arbeiðsleys**

HAGTØL
*Heri á Rógvi*

Við árslok búðu 46.996 fólk í Føroyum. Støðugt leggist meira til á okkara átjan oyggjum, og 1. august kundi staðfestast, at vøksturin í fólkatalinum stendur við, tí tá vóru 47.483 fólk búsitandi í Føroyum. Størsti vøksturin í prosentum er í Vágum, har fólkatalið er frá 31. desember til 1. juli er voksið við 1,9%. Høvuðsstaðurin hevur næst størsta vøksturin fyri sama tíðarskeið við 1,3%, sum eru 228 fólk. Á Sandoynni stendur fólkatalið í stað, men alla aðrastaðni í Føroyum veksur fólkatalið. Samanlagt er fólkatalið í Føroyum voksið við einum góðum prosenti í ár.

Arbeiðsloysið í Føroyum er eisini støðugt minkandi. Hin 1. januar 2001 1.093 føroyingar ella 4,5% arbeiðsleysir. Hetta tal er nú minkað til 590 ella 2,3%. Hetta sæst í teimum nýggjastu hagtølunum hjá Hagstovu Føroya.
Hagstovan vísir eisini á eitt serføroyskt fyribrigdi, sum er fiskavirkisskipanin. Taka vit talið av arbeiðsleysum í fiskavirkisskipanini við, so eru 706 fólk ella 2,8% arbeiðsleys.

Tá roknað verður arbeiðsloysi í fiskavirkisskipanini, so verður so verður roknað útfrá tímatali.

Føroysk flakisvirkisfólk eru í einum slag av einari trygdarskipan, har tey eru tryggjaði eina 32 tímar viku. Tá roknað verður út, hvussu nógv arbeiðsleys eru í skipanini, so verður samlaða tímatalið býtt við 32, og harvið sæst, hvussu nógv havi verið í arbeiði. Tað er rættiliga skjótt at ímynda sær, hvørja ávirkan ein vantandi arbeiðsdagur fær á tølini.

Tá tosað verður um arbeiðsleys sum heild, so verður hugsað um fólk, sum eru tøk á arbeiðsmarknaðinum, men einki arbeiða hava í eitt tíðarskeið. Tað merkir so, at skúlanæmingar, pensjónistar og fólk, sum eru so illa fyri, at tey verða umfata av einari serligari grein í forsorgarlógini, ið ger at tey ikki kunnu roknast sum tøk á arbeiðsmarknaðinum.

Tey 590, tá hyggja vit ikki eftir fiskavirkisskipanini, eru sostatt fólk 16 ár og eldri í Føroyum, sum eru tøk á arbeiðsmarknaðinum, men ikki hava arbeiði í løtuni. Av teimum 590 eru 443 í ALS-skipanini og 147 fáa bert stuðul frá Almannastovuni. Tað kunnu vera ymsar orsøkir til, at fólk bert fáa stuðul frá Almannastovuni. Ein orsøk kann vera, at viðkomandi kann hava verið ov leingi í ALS-skipanini ella ikki hevur arbeitt áður hann ella hon gjørdist arbeiðs/ur, soleiðis ikki hevur vunnið rætt til at vera í ALS-skipanini.



*Tað eru ógvuliga fá í Føroyum, sum sita fyri einki, men nøkur eru.*

## Kvinnurnar ringast fyri

Hyggja vit so nærri eftir teimum 590, leggja vit til merkis, at kvinnurnar umboða størsta partin. 3,7% ella 393 kvinnur eru arbeiðsleysar.

Tað er torført at siga, hvør orsøkin til hetta er, men millum orsøkirnar eru óivað støðan hjá kvinnuni sum mamma og vantandi útboðið av arbeiðum til kvinnur, t.e. starvsbólkar, har kvinnur so at siga ikki luttaka.

Taka vit flakakvinnurnar við, so eru heili 481 kvinnur umboðandi 4,5% av samlaðu kvinnuligu arbeiðsmegini tøkar á arbeiðsmarknaðinum, men hava einki arbeiði.

## Framvegis arbeiðsloysi

Hans Pauli Strøm, sum starvast á Hagstovu Føroya og er útbúgvin sosiologur, sigur, at prátið um, at einki arbeiðsloysi er í Føroyum als ikki rætt.

– Talið er lægri enn tað nakrantíð hevur verið, og hjá monnunum stendur væl til, men kvinnurnar eru eftirbátur, sigur Hans Pauli Strøm.

Arbeiðsloysið er eisini minkað nógv í ár. 209 fólk hava funnið nýtt arbeiðspláss síðani januar mánað. Tá var arbeiðsloysið 3,2%.

Samanbera vit árið í fjør við í ár, kann leggjast til merkis, at talið av arbeiðsleysum eisini var lágt í august og september, men vaks so aftur í endanum av árinum. Frá oktober 2001 til februar 2002 lá talið av arbeiðsleysum millum 3,3 og 3,1%.